Vinningur: Bjóða 17 vinum við til Lalandia við Atlantic Airways

# Stórur áhugi fyri Atlantsflogi




## Tað gongur strúkandi hjá føroyska flogfelagnum, sum hevur ein støðugan vøkstur í talinum á ferðafólkum

Tað er nógv hent hjá Atlantsflogi, síðani felagið varð stovnað í 1988. Byrjað var við einum flogfari í kappingini ímóti Maersk á leiðini til Keypmannahavn, men nú flýgur Atlantsflog við fleiri flogførum til fleiri býir uttanlands.

Tað vóru nógv, sum ivaðust í, um felagnum varð lív lagað, tá ið tað varð stovnað fyri næstan 20 árum síðani. Men søgan hevur prógvað, at Atlantsflog, sum setti Føroyar í miðdepilin, hevur tænt føroyingum bæði væl og virðiliga. So væl, at felagið síðan hevur keypt fleiri flogfør av sama slagi fyri at nøkta eftirspurningin, sum er nógv øktur, so hvørt Atlantsflog hevur økt um flogleiðirnar til at fevna um øll grannalondini.

Atlantsflog er meira enn bara flogfør, tí á ferðskrivstovuni hjá Atlantsflog ber til at keypa pakkaferðir ella fáa sett saman sín egna ferðapakka út í heim. Í vetur eru øll tey spennandi tilboðini savnað í blaðnum Út í heim, og har ber til at gera ferðir til spennandi støð og býir uttanlands.

Næstu summarhálvu fer Atlantsflog aftur at flúgva til somu býir, sum flogfelagið hevur flogið til seinnu árini. Her er talan um Keypmannahavn, Aalborg, Billund, Reykjavík, London, Aberdeen, Stavanger, Oslo, Hetland og Grønland.

- Vit merkja ein stóran áhuga fyri ferðum næsta summar. Fólk eru í góðari tíð við sínum bíleggingum, og tey hugsa longu nú um síni ferðamál næsta summar. Vit vita longu nú, at tað verður ein sera stór ferðsla av landinum við Atlantsflog næsta summar, sigur Kent Christensen, søluleiðari hjá Atlantsflogi.

Lesa meira um Atlantsflog og teirra útboð á www.atlantic.fo

Vinningur: Olja fyri 10.000,- kr. frá Shell

# Shell hjálpir tær at halda hitan




Í yvir 80 ár hevur Føroya Shell hjálpt føroyingum við at halda hitan, hava maskinur og bilar koyrandi og skipini siglandi.

Tað byrjaði við einari tunnu av olju í 1925, og í dag er talan um eina stóra og landsfevnandi fyritøku, sum undir nútímans umstøðum veitir privatum viðskiftafólkum, tí almenna og vinnulívinum bæði á sjógvi og landi tænastur.

Sum árini eru liðin, er virksemið hjá Shell í Føroyum nógv víðkað. Felagið bygdi sína fyrstu Shell-støð á Frælsinum í Havn, og hon læt upp ólavsøkuaftan 1970. Í dag eru 10 Shell-støðir kring landið og átta Shell-avgreiðslur, har fólk kunnu bíleggja olju og fáa fatur á hitatænastuni, um tað er vorðið øskukalt.

13 tangabilar koyra oljuna hvønn dag um allar Føroyar. Shell innflytir oljuna við egnum skipi, og hon verður flutt til oljugoymslurnar, Shell-støðirnar, latin í tangar hjá húsarhaldum, koyrd umborð á skipini og so víðari.

Shell-støðirnar hava stórt úrval av gerandisvørum, og Shell-netið í Føroyum er soleiðis skipað, at Shell er nær viðskiftafólkunum í gerandisdegnum, og harvið kann veita so skjóta og góða tænastu sum gjørligt á øllum økjum.

Ein tunna í 1925 bleiv sostatt til eitt umfatandi virksemi og sølu í milliónatali av oljulitrum 80 ár seinni. Í 2004 seldi P/F Føroya Shell tilsamans 165.731.000 litrar av olju. Tað er umleið ein millión tunnur.

Í jólakappingini hjá Sosialinum kanst tú vinna olju til tíni hús fyri 10.000 krónur. Sjálvandi koyrt í tangan av oljubili hjá Shell.